# Sivic sigra›i !

*Eftir at KÍ fekk eina katastrofala byrjan uppá landskappingina í ár, tykist ta› sum klaksvíkingarnir nú eru vi› at finna FM formin, teir høvdu seinasta kappingarár. Sunnudagin vunnu teir ein sera dramatiskan dyst móti oddali›num B36 í Gundadali*

*Jákup á Borg fær bóltin frá Marek*

Heini í Skorini

Lagt var upp til ein sera spennandi dyst í Gundadali sunnudagin millum føroyameistararnar frá í fjør, KÍ, og suverena oddali›i› í ár, B36. Samstundis var hetta fyrsti dystur hjá KÍ venjaranum Tomislav Sivic móti sínum gamla felagi, og var hetta vi› til at gera dystin meira spennandi.

Ve›ri› var gott í Gundadali, tá dómarin Niklas á Lí›arenda bríksla›i dystin í gongd, og nógv fólk var eisini komi› at fylgja vi› spennandi dystinum.

Bæ›i li›ini løgdu naka› varisliga út, og fyrsti veruligi málmøguleikin kom eftir 10 minuttir. Bólturin var› spældur út í høgru sí›u og sí›ani lagdur sera væl innfyri. Ove Nysted var hægstur, og naka› inni í brotsteiginum skalla›i hann bóltin upp í nærmasta málhorni›, men ungi B36 málverjin Tróndur Vatnhamar bjarga›i meistarliga og fekk beint bóltin upp um máli› til hornaspark. KÍ li›i› hev›i yvirvág í spælinum næstu 10 minuttirnar, hóast B36 svenskarin Håkan Lundholm hev›i eina naska roynd vi› høvdinum í 16. minutti. Bæ›i li›ini tóktust at blíva meiri og meiri nærgangandi, og ta einu løtuna leika›i ta› sera hart á frammanfyri fyri KÍ máli›.

## Genialt KÍ mál

Men í 25. minutti vísti KÍ seg frá síni bestu sí›u, og tá teir gera ta›, eru ta› fá li› í Føroyum, sum kunnu ste›ga teimum. KÍ fekk innkast langt inni á B36 hálvuni úti í vinstru sí›u. Innkasti› var› tiki› stutt, og sí›ani spældu landsli›sleikarin John Ryan og ungi Kristian á Lakjuni seg sera flott ígjøgnum vinstru sí›u vi› einum dupult-bandaspæli. John kom so aftur á baklinjuna, har hann leg›i bóltin sera væl innfyri til hin landsli›sleikaran Rógva Jacobsen. Rógvi kom framum B36 verjuleikaran, sum skuldi dekka hann, og har kundi hann ótarna›ur og flott geva gestunum lei›sluna vi› at skalla bóltin inn framvi› nærmastu stong, uttan at Tróndur Vatnhamar hev›i nakran møguleika at bjarga.

Eftir hetta gjørdist dysturin naka› rokutur, og ta› tóktist sum dómarin var vi› at missa tamarhaldi›. Serliga hoyrdi ein grei›a misnøgd inn á dómaran úr B36 sk‡linum, og Ronnie Samuelsen og John Ryan komu bá›ir í bókina hjá dómaranum. Seinastu 10 minuttirnar av fyrra hálvleiki byrja›i B36 li›i› veruliga at tr‡sta KÍ verjuna. Í 34. minutti fekk ein KÍ leikari í sí›stu løtu blokera› eitt skot frá Jákupi á Borg út til hornaspark, og eftir at hornasparki› var› sent innfyri, og KÍ verjan ikki fekk rudda› upp benanvegin, var Egil Zachariassen nær vi› at javna fyri heimali›i›, men n‡ggi málverjin Zoltan Kujundzic bjarga›i sera væl. Næstu minuttirnar høvdu bæ›i li›ini einstakar royndir á málini, men her kom einki burturúr, og hálvleiksstø›an var sostatt, at KÍ var á odda 1-0.

## Tvey mál innan ein minutt

Svenski venjarin hjá B36, sum í Havn ver›ur kalla›ur “Pelle” (Per Olov Andersson), hevur uttan iva í hálvleikinum givi› sínum leikarum ein veruligan uppsang, tí B36 leg›i sera hart út í seinna hálvleiki. Teir tr‡stu KÍ máli› sera nógv, og í 5. minutti fekk Magni á Lakjuni møguleikan at javna fyri B36, men vinkulin úr vinstru sí›u gjørdist ov spískur, og Zoltan kundi bjarga skotinum frá fyrrverandi HB manninum.

Men ta›, sum ofta hendir, tá eitt li› satsar ov nógv offensivt, er, at ta› kostar í hinum endanum, og sunnudagin var einki undantak. Ove Nysted, sum stríddist væl í álopinum hjá KÍ, fekk bóltin á mi›juni, og sendi vi› eini frálíkari avlevering Rógva Jacobsen avsta› út ímóti vinstra horni. Rógvi, sum sunnudagin var fremsti ma›ur hjá KÍ, vendi sær á í vinstru sí›u og smekka›i bóltin væl inn í B36 brotsteigin. Har kom li›skiparin hjá KÍ, Jan Andreasen, rennandi, og vi› høvdinum kundi hann púra ódekka›ur skalla bóltin framvi› Tróndi og í B36 máli›. Frøin var stór í tí stóra sk‡linum, har KÍ ásko›ararnir hildu til, av tí at nú fór sjálvandi at vera sera torført hjá heimali›num at koma inn aftur í dystin.

Men solei›is skuldi ikki vera. Bert ein minutt seinni fekk B36 hornaspark í vinstru sí›u, eftir at Håkan Lundholm enn einafer› hev›i roynt málmansevnini hjá Zoltan í KÍ málinum (tey síggja út til at vera sera gó›), og Jákup á Borg fór út at taka. Hornasparki› var› tiki› lágt innfyri, og eftir at bólturin var farin framvi› fleiri bæ›i B36 og KÍ spælarum, kundi Jens Kristian Hansen smekka bóltin í neti› og gav harvi› B36 n‡ggja vón. Rómurin var øgiligur í B36 sk‡linum, og B36 leikararnir vóru sum vera man sera gla›ir og uppsettir uppá at fáa útjavnandi máli›.

## Håkan misn‡tti

Hetta máli› gav sum sagt B36 n‡ggja vón, og næstu minuttirnar leika›i sera hart á framman fyri KÍ máli›. Håkan Lundholm fekk eina gó›a sending og vi› einum verjuleikara vi› hvørja li›, kom hann vi› fullari fer› ímóti málmanninum. Fleiri vænta›u, at B36 nú fekk útjavnandi máli›, men Håkan skeyt beint á málverjan. Og bert seks minuttir seinni hev›i Håkan Lundholm enn ein gó›an møguleika. Hann fekk bóltin høgrumegin inni í brotsteiginum, og hóast hann hev›i Ronnie Samuelsen púra frían hinumegin, valdi hann at skjóta sjálvur, og enn einafer› bjarga›i Zoltan Kujundzic. Ronnie Samuelsen vísti greidliga sína ónøgd vi›, at Håkan skeyt sjálvur.

Hin n‡ggi jugoslaviski spælarin hjá KÍ, Srecko Milicevic, kom í 19. minutti av seinna hálvleiki inn fyri He›in á Lakjuni, og hann fekk eisini møguleikar at skjóta sítt fyrsta mál fyri KÍ. Í 25. minutti fekk hann bóltin inni í B36 brotsteiginum eftir gott innlegg frá Harley Bertholdsen, men hann gav sær ov gó›a tí›, og skoti› hjá honum var› blokera›. 10 minuttir seinni hev›i hann enn ein gó›an møguleika, men Tróndur í B36 málinum bjarga›i. Hóast B36 hevur havt ein trupulleika á aftasta skansa, so roynist Tróndur Vatnhamar væl í B36 málinum, hóast hann sunnudagin gott hev›i kunna› spælt bóltin skilabetri frá sær vi› sínum útspørkum og útkøstum.

## Nær vi›, at Jan Joensen fekk reytt

Jan Joensen, sum er li›skipari hjá KÍ, stríddist væl allan dystin. Hann var ágr‡tin og vann nógvar bóltar, men í 27. minutti gjørdist hann eitt sindur ov heitur, og nógv vóru á einum máli um, at Jan skuldi fingi› rey›a korti›. Eftir at Bjarni Prior hev›i gjørt eina naka› har›a takkling vi› KÍ li›skiparan, fleyg ø›i í hann, og hann gjørdi ikki minni enn at sláa Bjarna, so Bjarni datt ni›ur í “gólvi›”. Niklas á Lí›arenda hev›i beinanvegin gula korti› á lofti, men fleiri vóru sera ónøgd vi›, at Jan Joensen ikki var› rikin av vølli.

Nú bert 10 minuttir resta›u í, ráddi um hjá KÍ at verja 2-1 lei›sluna, og teir fluttu eisini Rógva Jacobsen aftur í verjuna. B36 royndi eisini at gera naka› vi› stø›una, og teir gjørdu offensivar útskiftingar. Fyrst skiftu teir Mikkjal Thomassen út vi› Gunnar Nielsen, og eitt sindur seinni kom 19 ára gamli bretin, Nathan Haslan, inn fyri Ronnie Samuelsen. Nathan Haslan kom til Føroya hósdagin, og hann royndarvenur í hesum døgum í B36. Dagliga leikar hann í felagnum Sheffield Wednesday. Vi› hesum útskiftingunum royndi B36 at fáa útjavnandi máli›, men nærri enn eitt fríspark frá Jens Kristiani Hansen, sum tó fór beint upp um, kom B36 ikki.

Í yvirtí›ini fekk KÍ eitt skjótálop, og her gjørdi Herbert í Lon ikki mætari enn at skumpa ein KÍ leikara um koll, sum var á veg ímóti málinum, og Herbert fekk rey›a korti›. Tí›in var runnin út hjá B36, og vi› bert 10 monnum kundi B36 so als einki gera. Endaliga stø›an gjørdist sostatt 2-1 til KÍ, og teir byrja nú at nærkast toppinum eftir eina heldur ivasama byrjan.

## Fyrstu fer› í ár, at vit spældu væl

Sivic seg›i eftir dystin, at hetta var teirra besti dystur í ár, og at hann var sera nøgdur.

-Dysturin í dag var sera spennandi. Tvey gó› li› møttust í dag, B36 hev›i jú ikki tapt undan hesum dystinum í ár, so eg eri sjálvandi gla›ur fyri sigurin í dag. Sivic sigur, at eftir eina ringa byrjan, komu teir til Havnar eftir trimum stigum, og ta› fingu teir so.

-Vit vistu á›renn, at hetta fór at vera ein sera torførur dystur at vinna, tí at B36 hevur nógvar gó›ar leikarar. Men vit spældu fyri fyrstu fer› í ár sera væl sum eitt li›, og ta› eri eg gla›ur fyri. Tá vit so koma inn á, hvussu ta› er at vinna á gamla li›i sínum sigur Sivic, at hann hev›i tr‡ gó› ár í B36, men at ta› var gott at vinna í dag.

## John og Kurt mangla›u

Eitt, sum merkti dystin sunnudagin, var, at ta› var ov líti› bit í álopspartinum hjá bá›um li›um, og at ta› vóru sera nógvir misn‡ttir málmøguleikar. Svari› uppá tann spurningin kann svarast vi› tveimum nøvnum : John Petersen og Kurt Mørkøre. Hesir bá›ir framúrskarandi áleypararnir eru sum teimum flestu kunnugt farnir uttanlands at spæla, og ta› sást sunnudagin, at missurin av teimum er stórur. Men bæ›i li›ini hava ungar lovandi kreftir, sum kunnu tra›ka inn, og ein teirra er 17 ára gamli KÍ leikarin Kristian á Lakjuni, sum tó ikki er áleypari. Sivic rósti honum í hvussu so er sera nógv eftir dystin móti B36.

-Eg eri serliga gla›ur um ein spælara í dag, og ta› er Kristian á Lakjuni. Hann var yngsti leikari á vøllinum, men eftir mínum tykki var hann eisini tann besti...

**B36:**
Tróndur Vatnhamar-Egil Zachariassen, Mikkjal Thomassen, Herbert í Lon-Dánjal Petur Johansen, Jan Guttesen, Jens Kristian Hansen, Magni á Lakjuni-Jákup á Borg, Håkan Lundholm, Ronnie Samuelsen.

**KÍ:**
Zoltan Kujundzic- Andrzej Pacek, Niclas Niclassen, John Ryan, Harley Bertholdsen - Marek Wierzbicki, Kristan á Lakjuni, Jan Joensen - He›in á Lakjuni, Ove Nysted, Rógvi Jacobsen.



Viðmerking:

# Petur Reinert var ikki faðir á studningsbúskapinum



Í Sosialinum 25. mai 2000 hevur Jóannes Eidesgaard, løgtingsmaður, eina viðmerking um Petur Reinert, sála. Sagt verður soleiðis í greininini. „Hesin grunnur (Ráfiskgrunnurin) ella henda skipan hevur síðani útgoldið nógvar milliardir í studningi til okkara høvuðsvinnu. Í tíðarskeiðinum frá 1980 til og við 1990 góðar 3 mia. kr. Sama tíðarskeið kostaði okkum 1,6 milliardir krónur í mistum veðhaldum“.

Lesarin fær av hesum ta mynd, at Petur bæði hevur politisku ábyrgdina av studningsruðuleikanum í áttatíárunum og teimum veðhaldum, sum vóru veitt eftir lóg un endurnýgging av skipaflotanum í áttatiárunum.

Petur fær ikki vart seg, men einki er meira skeivt enn at geva honum skyldina fyri studningsóskilið í áttatiárunum. Tað er rætt, at Petur hevði politisku ábyrgdina av heildarloysnini, sum var eitt politiskt stig hjá tí tásitandi landsstýri móti tí ógvisliga prísfalli, sum hevði verið á fiski frá 1974 til 1975.

Men ráfiskagrunnurin varð ikki dánaður, so sum Petur Reinert hevði ætlað. Fyri tað fyrsta vildi Petur hava hann í søluliðnum heldur enn í avreiðingarliðnum. Hann sá púra greitt vandan av at leggja skipanini í avreiðingarliðið, tí á tann hátt fór einki trýst at vera á søluliðið og virkisliðið, men trýstið for at liggja á landskassanum. Hesum sjonarmiði fekk hann ikki meiriluta fyri hvørki í landsstýrinum ella á løgtingi.

Petur vildi heldur ikki, at Ráfiskagrunnurin skuldi vera ein studningsskipan, men ein javningarskipan, har goldið varð inn í grunnin í góðum tíðum og úr grunninum í ringum tíðum. Landskassin skuldi bert veita eitt stovnsfæ og síðani skuldi Grunnurin hvíla í sær sjálvum. Hetta varð eisini arbeiðsetningurin hjá nevndini fyri Ráfiskagrunnin tey fyrstu. Tað var to ringt at fáa meiriluta í nevndini fyri hesum sjónarmiði, sum fráleið og eisini tyktist ofta at vera ein sterkur politiskur vilji at gjalda meira inn í grunnin.

Tann stóra broytingin í Ráfiskagrunninum sum studningsveitari kom tó ikki fyrr enn í 1983, tá tásitandi landsstýri broytti hann frá at vera ein javningargrunn til ein grunn, sum í veruleikanum skuldi fíggja fiskiskap eftir fisksaløgum, sum upsa og kongafiski.

At leggja Petur Reinert undir at eiga ábyrgdina av tí studningsbúskapi, sum hevur merkt Føroyar frá seinast í fimtiárunum og fram til nítiárini og sum fekk sínar mest ógvisligu avleiðingarnar í áttatiárunum og fyrst í nítiárunum, er púra burturvið og kann ikki fáa loyvi at standa uttan svar.

**Kjartan Hoydal**

# Olivia úti á Bø í Leirvík 85

Mánadagin 22. mai fylti fastir úti á Bø 85.

Fyri mær hevur hon altíð verið ímyndin av hugtakinum konubrot. Hon minnir nógv um Gretu, ommusystur, sum nú hevur rundað tey 102 árini – altíð til dystin fús, full av áræði og lívsvilja.

Olivia er borin í heim inni á Toftanesi – barnaheimið stendur stutt niðan frá neystunum, og kirkjan er næsti granni. Tey vóru trý systkin; Olivia var tað mittasta, og nú er bert hon eftir á lívi. Hon misti pápan sum 17 ára gomul, so har bleiv nógv at takast við, tí handil var í húsinum.

Sum ung var hon á háskúla í Danmark, og hevur hon líka til denna dag varðveitt sambandið við tær, sum hon kom at kenna tá.

Háskúlahugsjónin hevði bitið seg fasta í sinnið, og nógv man hon hava tosað við børnini um hetta, tí fleiri teirra leitaðu á slíkar skúlar.

Fastir giftist við John gubba, son Jógvan við Neyst. Tey settu búgv úti á Bø, nakað niðan frá neystunum úti í Bug og fingu átta børn saman, men upplivdu ta stóru sorg at missa Maluna bert 37 ára gamla; hetta var í 1990.

Undir krígnum sigldi John við Sæborg og í fimtiárunum fekk hann sær útróðrarbátin Ternusker. Seinni róði hann fleiri summør út í Føroyingahavnini.

Olivia var, sum vanligt tá í tíðini, tann, sum tók sær av øllum heima, tí John var jú burtur. Torvið skuldi fáast frá hondini og hoyggið, tí kúgv høvdu tey sum flestu hús tá.

Olivia og John voru bæði virkin í Heimamissiónini. Tey hildu sunnudagsskúla, og tá ið jólatræshald var fyri børnunum í missiónshúsinum, vóru tað mangan tey, sum søgdu frá søgum.

Eisini savnaði Olivia børn í bygdini í einum barnaringi, sum stuðlaði ytrimissiónsarbeiði, og mong minnist við takksemi aftur á ta tíðina.

Tá ið tey tóku kúnna av, fekk Olivia tað sjáldsama hugskot at planta eina viðarlund í gerðinum. Hon hevur altíð havt ein vilja sum stál, so at tað, sum hon setir sær fyri, eydnast sum oftast. Hon mátti jú fáa samtykki ymsastaðni, áðrenn farast kundi til verka. Har skuldi tosast við hagastýri, bygdarráð, friðingarnevnd og skógrøkt landsins. Men hon kom á mál, og í dag er hasin bletturin eitt prýði fyri bygdina. Her sæst sama seiggið og áræðið sum hjá systkinabarni hennara niðri við Hús, sum fór undir at fáa friðað gamla býlingin í Norðragøtu.

Oliviu hevur altíð dámt væl at virka úr ull, og í 1980 gav hon út bók við 215 skjalmynstrum. Hetta var ein kærkomin bók hjá mongum. Umframt at hava føroyskan tekst, var hon eisini skrivað á donskum og enskum.

Bæði Olivia og John hava stríðst við astma, sum jú setir sínar avmarkingar fyri, hvat ein orkar. Men tey stuðlaðu og hjálptu hvør øðrum fyrimyndarliga, so tey fingu væl burturúr. T.d. verður morgunfimleikurin aldri forsømdur.

Fyri nakað síðani andaðist John gubbi, so nú er fastir einsamøll undir lonini.

Stuttligt er at støkka inn á gólvið úti á Bø, tí blíð er hon sum fáur – lívsgleðin lýsir av andlitinum – og prátingarsom, tí nógvum veit hon at siga frá, m.a. úr sínum ungu døgum. Nú kann hon líta aftur á eitt ríkt og virkið lív.

Fastir, takk fyri mangar ógloymandi løtur har úti, og takk fyri brøv og telefonsamrøður hesar seinastu mánaðirnar – slíkt fløvar, og slíkt fær hugin at leita móti tí komandi heiminum.

Gudstrúgvin hjá teimum gomlu er ein sannur gripur hjá okkum, sum eru væl ávegis móti teimum árunum. Tey hvíla í síni barnatrúgv og hava lært at taka mótburð og koma víðari, tí tey vita, at tað, sum Gud ikki leiðir okkum uttanum, ber hann okkum ígjøgnum.

Vesturskinið er vakurt í Leirvík; seks vikur á hásumri sæst sólin seta í Djúpunum – vónandi verður vesturskinið blítt og fagurt eftir ein virknan arbeiðsdag, har lívsgleðin og hin livandi vónin lýsa av andlitinum.

Hjartaliga tillukku, fastir.

**Heilsan,**
**Karl**

## Ein heilsa til skyldmannin
# Sigurd á Gutta
## á áttatiára degnum týsdagin 30. mei

Letur ein lógv frammi í Skarð
á skarðlendisleið,
og másafuglur heldur fund uppi í Vatnsdal’
millum svimjandi eyðrriðar og síl
á blankum vatni í mai.

Læt ein so fródliga frótt:
Sigurd á Gutta
verður áttati
ár! —
• Nei, ikki er tað satt,
tað var sum í gjár,
hann reikaði her,
sum óviti, unglingi —
í mandómsins fagrasta skrúð,-
fór upp um skørð, -
legði til brots
út um nes og flúr,
og reið av sær mangan skúr
og mangt eitt nos og bylgibrot
á ytstu miðjum við Grønlandsfjørð
og Íslands kørgu jøkulsjørð. -

Frintligur, blíður og skemtingarsamur
ert tú altíð.

Vaksin upp á Gutta,
har mansevnið
millum brøður so sterkar
spældi í vøddum og spong
millum Nestanga og Stong
í Guttabáti -
út um landoddar
at fáa fong! -

So hoyrist á másarøddum upp í Vatnsdali í mai.

Flúgva másafuglar upp í loft
og lógvin syngur um Skorðatind hátt!
• Sigurd á Gutta,
hjartaliga til lukku,
nú tú ert áttati ár!
Satt at siga var tað sum í gjár,
tú fórt um Fuglafjarðarskarð!
So brosmubardur mangan vart,
áv útróðri komst,
og legði til brots
um Fjallarust
til Oyndarfjørð -
til tína heimajørð! –

Her hevur tú búð,
her hevur tú virkað,
her stendur tín kirkja
her stendur títt skrúð!

**Heilsan**
**Frits**